Summarkapping 2007

# Billund = LEGO





**LEGO fyri øll**
LEGO hevur í sínari framleiðslu lagt dent á at gera leikur, sum allir aldursbólkar kunnu brúka, og sum fólk á øllum menningarstigum kunnu brúka. Framleiðslan spennir frá teimum stóru leikunum til tey smæstu børnini til nútímans teldustýrdar leikur til børn og ung í dag. Tískil er LEGO fyri øll, sum fyritøkan sjálv sigur.

**Tað ber ikki til at tosa um Billund uttan at nevna fyritøkuna LEGO, sum hevur gjørt tann jútska býin heimskendan**

BILLUND
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Tá timburmeistarin Ole Kirk Christensen í 1932 fór undir at gera leikur út træi, kundi hann av góðum grundum ikki vita, hvat hetta stig fór at hava við sær. Men nú 75 ár seinni kunnu vit so staðfesta, at í dag eru leikurnar úr Billund millum tær best umtóktu um allan heimin.

Ole Kirk Christensen visti sjálvandi heldur ikki, at navnið LEGO skuldi fara inn í næstan hvørt heim, og tað eru helst eisini tey fáu, sum vita, hvaðani navnið stavar. Sjálvt orðið LEGO setti hann saman burtur úr donsku orðunum ”leg godt”. Sjálvur visti hann ikki, at á latíni merkir orðið lego millum annað at seta saman, so hann kundi valla verið meiri hepp-in við sínum navnavali.

Tær LEGO-leikurnar, sum vit kenna í dag, hava sín uppruna fyri næstan 50 árum síðani, og tað eru tær óteljandi avbjóðiongarnar, sum hava gjørt hesa leikuna til nakað heilt serligt.

Í 1950-árunum var leiðsluskifti í LEGO-fyritøkuni, tá Godtfred Kirk Christensen, sonur stovnarans, tók við. Nøkur ár seinni bleiv framleiðslan løgd undir felagsheitið ”Spæl og lær”, og við tí fylgdi tann hugsan, at tað ber til at læra við at spæla. Í 1958 kom so tann væl kendi samansetingarhátturin, sum eyðkennir LEGO-leikurnar, og sum legði grundarlag undir heimsins best kenda leika.

### Stór menning

Tíðirnar broytast og ikki minst á leikuøkinum. Fyrst í sekstiárunum eydnaðist tað LEGO at gera hjól, sum kundu brúkast saman við leikunum, og í 1966 koyrdi tað fyrsta LEGO-tokið við einum lítlum motori.

Um sama mundið bleiv framleiðslan eisini broytt, soleiðis at LEGO fór undir at gera leikur í tveimum støddum ásannandi, at tey yngstu hava lættari at spæla við teimum størru leikunum.

Í 1974 komu teir fyrstu LEGO-figurarnir á marknaðin. Longu frá byrjanini varð avgjørt, at figurarnir skuldu ikki hava navn, so børnini kundu fáa fríar teymar til at nevna síni leiku.

Í 1979 var aftur leiðsluskifti í LEGO-fyritøkuni, tá triðja ættarliðið, Kjeld Kirk Christensen, tók við sum aðalstjóri. Hann helt fram við at menna framleiðsluna, og eitt úrslit av tí var, at LEGO fór undir at gera leikur, sum høvdu tilknýti til rúmdina og rúmdarferðir.

Í 1984 tók LEGO upp samstarv við ein amerikanskan tøknistovn, og úrslitið av hesum samstarvi varð, at LEGO fór undir at brúka teldustýrdar leikur, og seinni komu teir væl kendu LEGO-robottarnir á marknaðin.

Síðani aldarskiftið hevur LEGO eisini fingið fótin fastan í filmsheiminum og hevur í tí sambandi samstarvað við so kend filmsfólk sum Steven Spielberg og so kend filmsfeløg Warner Bros.



*Puntur nummar 17 av 23*





www.sansir.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600,
Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari